Munnligur fyrispurningur til

**Jørgen Niclasen, landsstýrismann**

um andsøgn millum fyrisitingarlóg og noktandi innlit í CIP-sáttmála

1. Hví letur landsstýrismaðurin hvørki heilt ella partvíst alment innlit í CIP-sáttmálan ?
2. Hvat samsvar er millum §15, stk. 2. í fyrisitingarlógini og avgerð landsstýrismansins ?
3. Nær væntast samgongan at vera klár við uppskoti til Skálafjarðatunnil ?
4. Hví varð farið frá ætlanini at hava andstøðuna við í arbeiðinum fyri at fáa breiða semju ?

**Viðmerkingar**

Fíggjarmálaráðið hevur nú fráboðað, at ráðið og landsstýrismaðurin eru samd við avgerðini hjá fyrrverandi Innlendismálaráðnum og fyrrverndi landsstýrismanninum í innlendismálum – um ikki at lata innlit í CIP-sáttmálan.

Hetta undrar. Tí fyrisitingarlógin gevur sum høvuðsreglu borgara rættarkrav uppá innlit í øll skjøl í fyrisitingini. Skal undantak verða, má hetta hava greiða heimild í lógini.
Í svari uppá skrivligan fyrispurning vísir løgmaður sjálvur á, at “Ongin heimild er í lógini at gera avtalu við privat um, at samskifti millum myndugleikan og hin privata verður at undantaka frá lógini.”

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vísir hinvegin til §15 í fyrisitingarlógina, tá hann vil nokta innlit fyri at verja fíggjarlig áhugamál og vinnuvirksemi hjá tí almenna. Eisini henda grundgeving undrar.

Tí nógv bendir á, at innlit átti nevnliga verið latið, júst fyri at verja fíggjarligu áhugamálini hjá tí almenna.

Tá landsstýrismaðurin hvørki vil lata heilt ella partvíst innlit í CIP-sáttmálan, er hartil sera ivasamt um hetta er í samsvar við fyrisitingar lógina - herundir §15, stk. 2.

“§ 15. Rætturin til skjalainnlit kann annars avmarkast í tann mun, áhugin hjá partinum í at kunna nýta kunnleika til skjøl í málinum til at røkja sín tørv má metast at eiga víkja fyri avgerandi umhugsni fyri viðkomandi sjálvum ella øðrum privatum ella almennum áhugamálum, herímillum

1) trygd ella verju ríkisins,
2) uttanríkispolitisk ella uttanríkisfíggjarlig áhugamál, herundir viðurskiftini við aðrar tjóðir ella millumtjóða stovnar,
3) fyribyrging, avdúkan og søkjan at lógarbrotum, revsingarfullgerð og líknandi og verju av ákærdum, vitnum ella øðrum í málum um revsi- ella agasókn,
4) fremjing af almennum eftirliti, skipanar- ella ráðleggingarvirksemi ella ætlaðum tiltøkum sambært skatta- og avgjaldslóggávuni,
5) fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna.

Stk. 2. Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum.”

Á Løgtingi, 5. november 2013

**Kristina Háfoss**
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi